FOLKETINGETS OMBUDSMAND




# Klaga til umboðsmannin

Tú kanst klaga til fólkatingsins umboðsmann, um tú ert ónøgdur við svarið ella viðferðina, tú hevur fingið hjá einum almennum myndugleika. Tú kanst eisini klaga um viðgerðartíðina.

Øll kunnu klaga, og tað kostar ikki.

Klagur til umboðsmannin skulu vanliga vera skrivligar. Navn og bústaður hjá klagara skulu upplýsast. Brøv til og frá myndugleikanum og onnur skjøl, sum hava samband við málið, skulu leggjast við klaguna.

Við at brúka klagublaðið á heimasíðuni hjá umboðsmanninum kanst tú fáa hjálp til at

- trygt senda klagur og fylgiskjøl
- fáa allar upplýsingarnar, sum umboðsmaðurin hevur tørv á.

Klagublaðið er tøkt á ombudsmanden.dk/klageskema

## Aðrar reglur fyri klaguna

Áðrenn tú klagar til umboðsmannin, skal myndugleikin, sum tú klagar um, hava svarað.

Um tú kanst klaga aðrastaðni enn hjá umboðsmannininum um svarið frá myndugleikanum – t.d. til Ankestyrelsen – so skalt tú gera tað fyrst. (Tað stendur í brævinum frá myndugleikanum, um tú kanst klaga).

Umboðsmaðurin skal móttaka klaguna í seinasta lagi eitt ár eftir, at tú hevur fingið myndugleikans avgerð.

Tú kanst ikki klaga til umboðsmannin um dómar ella dómstólarnar.

Tú kanst heldur ikki klaga um innihaldið av teimum lógum, sum fólkatingið hevur samtykt.

Tú kanst vanliga ikki klaga um privatar fyritøkur og privatpersónar. Tú kanst tó klaga um m.a. fosturfamiljur og privatar barnastovnar.

## Klaga send við

Tú kanst senda eina klagu sum ein tryggan teldupost umvegis tín talgilda postkassa á Borger.dk.

Sendir tú klaguna í einum vanligum, "ótryggum" telduposti, sendir umboðsmaðurin svar sítt til tín talgilda postkassa ella við vanligum brævi.



## At klaga vegna onkran

Um tú klagar vegna onkran annan, skalt tú senda eina fulltrú við klaguni.

Tú kanst møguliga taka eitt fulltrúarblað niður av heimasíðuni hjá umboðsmanninum.




ombudsmanden.dk/fuldmagt

## Mál hjá umboðsmanninum

Umboðsmaðurin ger sjálvur av, um hann kannar eina klagu nærri. Um hann sær, at hann ikki er førur fyri at hjálpa klagaranum til eitt betri úrslit, sendir hann vanliga eitt stutt svar og endar málið.

Um umboðsmaðurin heldur, at ein myndugleiki hevur gjørt mistøk, kann hann finnast at myndugleikanum og biðja myndugleikan um at endurkanna málið.

Tað eru als ikki allar klagur, sum geva umboðsmanninum orsøk til at kanna eitt mál nærri – men støða verður tikin til allar umsóknir.

## Hvør er umboðsmaðurin

Fólkatingsins umboðsmaður er løgfrøðingur og valdur av fólkatinginum. Uppgáva hansara er at hava umsjón við at almennir myndugleikar fylgja lógini og geva borgarunum eina góða og rætta viðferð.

Umboðsmaðurin kann kanna klagur, og hann kann eisini taka mál upp, hóast eingin hevur klagað.

Hann kann viðmerkja avgerðirnar og málsviðgerðina hjá myndugleikunum. Hann kann finnast at myndugleikar, um teir hava gjørt mistøk, og hann kann eitt nú mæla til, at ein myndugleiki tekur eina nýggja avgerð ella broytir háttin at handfara ávís mál.

Umboðsmaðurin kann ikki gera av, hvat myndugleikarnir skulu gera. Myndugleikarnir fylgja tó í verki tilmælunum hjá umboðsmanninum.

Karmarnir fyri umboðsmansins arbeiði eru ásettir í um boðsmannalógini.

FOLKETINGETS OMBUDSMAND

Fólkatingsins umboðsmaður
Gammeltorv 22
DK 1457 København K
Tlf. +45 33 13 25 12
www.ombudsmanden.dk
post@ombudsmanden.dk

Tú kanst skriva til umboðsmannin umvegis talgilda postkassan á Borger.dk.

Upplýsingar um telefontíðir og persónligar áheitanir eru at finna á ombudsmanden.dk/kontakt.

Á heimasíðuni hjá umboðsmanninum eru eisini fleiri upplýsingar um, hvussu umboðsmaðurin arbeiðir, og hvørjum hann kann hjálpa við.